

**BMW 318I TOURING**
Árg 96, Km 48.000. .



**BMW 316I**
Árg 95, Km 38.000. útgjald bert 35.000. Kr. 155.000.



**FORD FIESTA**
Árg 96, Km 50.000. útgjald bert 15.000. Kr. 58.000.



**PEUGEOT 406**
Árg 96, Km 98.000. útgjald bert Kr. 28.000. .

**Í dag, leygardagin er opið frá 10 - 15**

FIAT
**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300


# Stovna nú felagið fyri minnisveik

**Stovnandi aðalfundur verður 9. september**

ELDRARØKT
*Eirikur Lindenskov*

– Bólkurin, ið varð settur á fyrireikandi fundinum tann 25. juni til at stovna felagið, er nú farin til verka, tey høvdu sín sín fyrsta fund mikukvøldið 18. juni, sigur Sigrun Mohr vegna fyrireikingarbólkin.

Tey, ið manna bólkin, eru avvarðandi hjá minnisveikum, fakfólk og onnur áhugað, og eru hesi fólk ógvuliga eldhugað at arbeiða fyri hesari søk, tí tørvurin á slíkum felagsskapi er stórur.

Ætlanin er at hava stovnandi aðalfund sunnudagin 9. september. Á tí fundinum verða løgd fram navn og endamál fyri felagið og viðtøkur, og sjálvandi skal nevnd veljast.Ætlanin er eisini at fá onkran at halda fyrilestur um evnið.

Fyrireikararnir vóna, at stuðulin eins dyggur og á fyrireikandi fundinum, har útivið hundrað fólk møttu.

Maretec á Argjum:

# Útvega skip til oljuvinnuna



*Seabrokers, sum skipsmeklaravirkið Maretec á Argjum nú samstarvar við, hevur longu verið inni á marknaðinum í Føroyum. Teir skipaðu m. a. fyri avtaluni millum Statoil og Havborg Supply um skipini »Havila Carisma« og »Havila Clever«*

**Skipsmeklaravirkið Maretec á Argjum brynjar seg eisini út til eina møguliga oljuvinnu í Føroyum**

OLJUVINNA
*Eirikur Lindenskov*

– Í síðstu viku skrivaðu vit undir samstarvsavtalu við Seabrokers, sum er eitt av teimum leiðandi feløgunum í Noreg innan chartering av sypply-, standby- og vaktarskipum tl oljuvinnuna, sigur Álvur Mortensen á skipsmeklaravirkinum Maretec á Argjum.

Seabrokers eru eisini serkønir í keypi og sølu og nýbygging av skipum til oljuvinnuna.

Álvur Mortensen sigur, at hetta er fyrsta samstarvsavtala av hesum slag millum eitt føroyskt og útlendskt felag.

Seabrokers hevur høvuðssæti í Stavanger og hevur eisini skrivstovur í Aberdeen og Rio de Janeiro.

Felagið hevur longu verið inni á marknaðinum í Føroyum. Teir skipaðu millum annað fyri avtaluni millum Statoil og P/F Havborg Supply Services í Leirvík um at veita supplytænastu v.m. til boripallin »Sovereign Explorer« , sum borar á føroyskum øki. Skipini, sum verða nýtt til hetta endamál, eru »Havila Carisma« og »Havila Clever«.

Fleiri av teimum føroysku fiskiskipunum, sum seinastu árini hava verði leigað til vaktarskip í norskum og bretskum øki, hava eisini verði leigað ígjøgnum Seabrokers.

– Endamálið við samstarvinum millum Maretec og Seabrokers er at skipa fyri chartering av supply-, standby- og vaktarskipum til oljuvinnuna á føroyskum øki. Somuleiðis at skipa fyri keypi og sølu og bygging av skipum til oljuvinnuna. Herumframt verður eisini arbeitt við at leiga føroysk veitingar- og vaktarskip til uppgávur á norskum og bretskum oljuøki, sigur Álvur Mortensen.

Sum ein liður í hesum samstarvi fer umboð hjá Maretec í næstum á skeið til Stavanger fyri at seta seg meira inn í charterings viðurskiftini v.m. í samband við oljuvinnuna.

**Tøkk**

Øllum tykkum, sum á ein og annan hátt mintust til mín á sjeytiáradegnum 30.05., takki eg hjartaliga.

Niclas

# Ættarfólkini hjá Mariu og Sámal Fundin hittast

**– Her aldist upp okkara ættarlið, vit royna at ala eitt komandi við.**

ÆTTARVEITSLA
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 22. juli hittast ættarfólk Mariu og Sámal Funding til ættarveitslu. Hesin hátíðardagur byrjar í Funningi kl. 10.00 við kaffi, og síðan verður farið í kirkju kl. 12.00. Eftir kirkjugongd, verður farið á grøvina hjá Mariu og Sámali. Síðan gongur leiðin til Leirvíkar í bygdarhúsið, har borðreitt verður við døgurða og tí, ið hartil hoyrir. Í Leirvík verður skipað fyri sangi, upplestri, hornblástri, og eisini verður onkur ættarsøga at hoyra.



*Maria Funding, fødd 1865 deyð 1956 og Sámal Funding føddur 1856 deyður 1944*

Maria og Sámal Funding, sum vóru búsett í Funningi, andaðust ávikavíst 1956 og 1944. Sámal hevði tá verið blindur í 56 ár. Saman áttu tey seks døtur. Ein teirra, Anina, doyði bert hálvt ára gomul, hinar vóru, Sigga, Súsanna vanliga nevnd Duda, Jacobina, Jóhanna og Samuelina.

Tað hevur stóran týdning at kenna síni ættarbond, serliga gerst ein varugur við at so er, tá ein verður tilkomin og sjálvur fær børn. Ein fær ofta hug til at vita meira um spurningar sum: Hvør líkist hvørjum? Hvussu vóru tey og tey? Hvørjar traditiónir hava verið í familjuni? Hvørjir eru mínir trímíningar, ferminingar osfr.

Prátið fall inn á familju, ætt og at savna funningsættina, tá yngsta systurin Samulina Petersen, sum var búsitandi í Funningi, andaðist í november í fjørð 92 ára gomul.

Sámal Christiansen, Klaksvík, sum er sonur Jóhonnu Christiansen, tók stig til at savna funningsættina og heitti hann á Sigvald Kristiansen, á Skála, sum er sonur Dudu, Selmu Høgnesen, í Klaksvík, sum er dóttir Siggu og Mariu Skorastein, Leirvík, sum er dóttir Samulinu um, saman við sær at fáa í lag eina ættarveitslu.

Við stuðli frá yngra ættarliðnum, er hendan ætlan fingin í lag og 220 fólk hava teknað seg til tiltakið, og er tað sera stórur partur av familjuni.

Alt sum skal liva og grógva krevur umsorgan og røkt, og er tað tí neyðugt at yngru ættarliðini binda bond og verja um funningsættina.

†

Tað verður kunngjørt fyri ætt og vinum, at elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Thomas Wilhelm**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið 18. juli, 90 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju sunnudagin kl. 15.00.

*Familjunnar vegna*

**Marjun og Bjarni**




